# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 23. mars 2010


# Stjørnan stórfavorittur

**Í kvøld bresta tey bæði fremstu kvinnuliðini í Sunset-kappingini, Tjaldur og Stjørnan, saman í fyrstu FM-finaluni, sum verður spæld í Runavík**





Hilmar Jan Hansen




Stjørnan hevur í vetur havt gott tak á Tjaldri, so tí eru klakvíkskvinnur stórfavorittar, nú fyrsta FM-finalan í Sunset-kappingini verður spæld í kvøld

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

FM-finalurnar í Sunset-kappingini eru ein endurtøka frá í fjør, tá Stjørnan eisini var á odda við landskappingarenda, so fyrsta finalan var spæld í Runavík. Ta ferðina vann Tjaldur fyrsta dystin, og tá annar dysturin var spældur í Klaksvík, vann Tjaldur aftur og gjørdist føroyameistari.

Men meðan kappingin í fjør var rættiliga jøvn og spennandi, hevur Stjørnan í nógv størri mun verið í sínum egna serklassa í vetur. Og av teimum seks dystunum í lands- og steypakappingini, sum hava verið millum liðini, hevur Stjørnan vunnið teir fýra. Um hugt verður at innanhýsis málúrtøkuni millum liðini í hesum seks dystunum, er hon stórliga til fyrimus fyri Stjørnuna: 157-139.

Serliga knúsandi var sigurin í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini, tá Stjørnan í Runavík vann við ikki færri enn 11 málum, so alt var væl og virðiliga avgjørt áðrenn seinnu hálvfinaluna, og Stjørnan fór eisini allan vegin og vann seinni steypakappingina.

## Góða og stóra breidd

Eisini á stigatalvuni hevur Stjørnan væl og virðiliga munin, tí við sínum tilsamans 37 stigum eftir 20 umfør, og tað eru seks stig fleiri enn Tjaldur, sum endaði á 31 stigum. Síðstu vikurnar hevur Tjaldur tapt fyri bæði Neistanum og VÍF, umframt at liðið bara vann við einum máli á VB.

Sostatt bendir alt á, at Stjørnan er stórfavorittur undan FM-finalunum í Sunset-kappingini, og eitt nú talar stóra og góða breiddin hjá klaksvíkskvinnum fyri, at tær eru sera væl fyri at taka greipuna í ár.

Hvussu væl tað gongur hjá Tjaldri, er sera nógv tengt at, hvussu útlendingarnir standa seg, og síðstu dystirnar hevur sæð út til, at Stjørnan hevur lagt seg væl eftir at skerja eitt nú stórskjúttan, Adinu Petrea. Tjaldur noyðist eisini at vera Corneliu Rimbu fyriuttan, so á pappírinum sær Tjaldur veikari út.

Men hetta eru finaludystir, har alt kann henda, so kanska verður kortini talan um tveir javnar og spennandi dystir. Spurningurin er so, um tað í ár verða tríggir finaludystir hjá kvinnunum, ella um annað liðið fer avstað við øllum við tveimum sigrum beinanvegin.

## Kvinnufinalistarnir

| | | |
|---|---|---|
| 28/10 | Tjaldur-Stjørnan | 30-25 |
| 13/12 | Stjørnan-Tjaldur | 20-15 |
| 20/12 | Tjaldur-Stjørnan | 20-31 |
| 26/12 | Stjørnan-Tjaldur | 30-29 |
| 10/01 | Tjaldur-Stjørnan | 23-23 |
| 28/02 | Stjørnan-Tjaldur | 28-22 |

### Finalurnar

| | | |
|---|---|---|
| 23/03 | Tjaldur-Stjørnan | 19.00 |
| 25/03 | Stjørnan-Tjaldur | 19.00 |
| 27/03 | Stjørnan-Tjaldur *) | |

**) Verður bert spæld, um liðini vinna hvør sína av hinum báðum*

# FC Hoyvík, Skála og Undrið víðari

**Undanumfarið í kappingini um Løgmanssteypið var um vikuskiftið, har trý lið spældu seg víðari til 1. umfar, sum verður leygardagin, tá átta dystir eru á skránni**





Hilmar Jan Hansen


Tað ovasta av teimum seks liðunum, sum spældu leygardagin, FC Hoyvík, var vitjaði Royn. Har eydnaðist hoyvíkingum á grasvøllinum í Hvalba at vinna 2-1, eftir at tað hevði verið 1-1 í hálvleikinum.

Jørgen Meitilberg legði gestirnar á odda longu í fimta minutti við brotssparki, áðrenn Poul Poulsen við einum góðum langskoti javnaði til 1-1. Bara fimm minuttir inn í seinna hálvleik skoraði Jørgen Meitilberg aftur, hesa ferð til 2-1, og tann leiðslan helt dystin út – hóast FC Hoyvík fekk ein mann útvístan og síðstu 20 minuttir var í minniluta á vøllinum.

MB og Skála, sum bæði fluttu niður úr 1. deild eftir landskappingina í fjør, møttust í Miðvági, har MB hevði eitt mestsum spildurnýtt lið, meðan Skála hevði tað nógva av fólkinum, sum eisini spældi við í fjør.

Skálamenn gjørdust teir drúgvari, tí teir vunnu 2-0 við tveimum málum, sum bæði komu í fyrra hálvleiki. Fyrst skoraði Jóhan Funn til 1-0 og síðani Jørmund Joensen til 2-0 í einum dysti. Skála var klárt betra liðið, men megnaði tó ikki at fáa fleiri enn hesi bæði málini.

## Undrið fingið ð

Triði dysturin var minst møguliga havnaruppgerðin, tí tann dysturin var millum FF Giza og Undrið, sum spældu á Argjum. Undrið hevur skift samleikan út og fingið eitt »ð« skoytt upp í navnið, sum í eygunum á fleiri hevur sæð út sum ein stavivilla, men tó ikki hevur verið tað, tí Undri var uppkallað eftir sínum íslendska høvuðsstuðli.

Undrið var eisini liðið, ið fór við sigrinum leygardagin, tí tað eydnaðist at vinna 2-1 á FF Giza, og øll málini komu í fyrra hálvleiki. Fróði Vang legði FF Giza á odda við beinleiðis frísparki, men góðar fimm minuttir seinni gjørdi eitt sjálvmál, at tað bleiv 1-1. Sigursmálið hjá Undrinum skoraði Christian Vilhelm við beinleiðis frísparki.

Tey trý vinnandi liðini eru sostatt komin víðari til 1. umfar í kappingini um Løgmanssteypið, sum verður spæld leygardagin, tá dystirnir eru hesir: HB-B36, Undrið-ÍF, AB-KÍ, B71-Víkingur, EB/Streymur-NSÍ, B68-07 Vestur, FC Hoyvík-TB og FC Suðuroy-Skála.